

HALLÓ



**Vagnur Mohr Mortensen**
havnarmaður og fótbóltsspælari

**Gleðir tú teg til ólavsøkuna?**
- Ja, tað geri eg altíð. Ólavsøkan er tað størsta og stuttligasta tiltakið í Føroyum.

**Er tað harmiligt, at tit skulu spæla fótbóltsdyst á ólavsøku?**
- Tað er fínasta slag. Eg gleði meg altíð at spæla á ólavsøku. Tað eru nógvir áskoðarar, og hýrurin er framúr.

**Fara tú og liðfelagararnir at drekka á ólavsøku?**
- Eg vænti ikki. Vit spæla dyst aftur mánadagin, og vit mugu verða væl fyri. Men eg skal ikki siga, at vit fara ikki at hugna okkum friðarliga eitt kvøld.

**Er tað stuttligt at spæla fótbólt, tá tú ikki kann drekka á ólavsøku?**
- Tú velur sjálvur at spæla fótbólt, og tú veit, at slík forboð eru. Men eg hugsi ikki so nógv um tað longur. Tað var meira ræðuligt, tá eg var yngri. Vit hava vanliga frí á ólavsøku, so tað bilar ikki, um vit ikki sleppa at drekka í ár.

# Nýggj bindiklubbabók

**Ein 7. flokkur í Hvalba hevur latið eina bindiklubbabók úr hondum. Tey fara sjálvi at ganga hús úr húsi í øllum landinum at selja. Bókin hevur bindiuppskriftir, mat- og kakuuppskriftir, umframt prát og hugleiðingar um binding**




Eydna Skaale

Tey skulu á eina uttanlandsferð til Danmarkar og Svøríkis, men tey tímdu ikki at skipa fyri bingo ella tombola, fyri at skaffa sær pening. Tískil kom lærarinnan, Rannveig Hovgaard, við hugskotinum um, at tey skuldu fara at gera eina bók.

Ein av næmingunum eitur Angela Helgadóttir, og hon sigur, at tey beinanvegin tóku undir við hugskotinum. Eisini dreingirnir, sum annars kanska ikki hava so stóran áhuga fyri binding.

- Tað ljóðaði spennandi, og vit vistu, at Rannveig einaferð fyrr hevði gjørt eina bók við einum øðrum flokki. So tá hon spurdi, um vit eisini skuldu gera eina bók, vildu vit gjarna tað, greiðir Angela frá.

## Læruríkt og stuttligt

Tey hava nýtt eina viku, har tey arbeiddu burturav við hesi bókini, og síðani hava tey av og á tikið í aftur okkurt, sum hevur manglað.

- Vit snakkaðu fyrst leingi um, hvat skuldi standa í hesi bókini. Og tá tað var komið uppá pláss, so fóru vit í gongd. Tað stuttligasta var, tá vit skuldu út á gøtuna at práta við fólk, heldur Angela.

Hon heldur, at hetta hevur verið sera læruríkt og spennandi.

## Út at selja

Bindiklubbabókin fæst bert til keyps í Rit og Rák og Gamla bókhandli í Havn og á Heimavirkinum í Vági. Men næmingarnir ætla sær eisini út at selja bókina hús úr húsi um alt landið við hjálp frá foreldrunum.

Bindiklubbabókin kostar 100 krónur og er 75 síður. Umframt matuppskriftir og bindiuppskriftir eru eisini ein hugleiðing frá Nicolinu Beder um føroysku ullina og ein hugleiðing frá Anniku Skaalum um bindiklubbar.

*eydna@sosialurin.fo*

## Í MORGIN




Lot til andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.

## MIKUDAGIN




Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.

## HÓSDAGIN




Fleyr til gul av vestri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, leygardagin mest av vestri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 12 log 16 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 997 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum týsnáttina.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið við Føroyar fer eisini í landnyrðing.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

**Hitalagið kring knøttin**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

26. juli Fullmáni
29. juli Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. juli | 07:51 | 20:11 | 06:51 | 19:11 | 07:06 | 19:26 | 09:51 | 22:11 | 10:51 | 23:11 |
| 27. juli | 08:32 | 20:51 | 07:32 | 19:51 | 07:47 | 20:06 | 10:32 | 22:51 | 11:32 | 23:51 |
| 28. juli | 09:11 | 21:30 | 08:11 | 20:30 | 08:26 | 20:45 | 11:11 | 23:30 | - | 12:11 |
| 29. juli | 09:49 | 22:06 | 08:49 | 21:06 | 09:04 | 21:21 | 11:49 | - | 00:30 | 12:49 |
| 30. juli | 10:23 | 22:40 | 09:23 | 21:40 | 09:38 | 21:55 | 00:06 | 12:23 | 01:06 | 13:23 |

| Dagur | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. juli | 06:06 | 18:26 | 05:06 | 17:26 | 08:06 | 20:26 | 09:06 | 21:26 | 07:36 | 19:56 | 08:51 | 21:11 |
| 27. juli | 06:47 | 19:06 | 05:47 | 18:06 | 08:47 | 21:06 | 09:47 | 22:06 | 08:17 | 20:36 | 09:32 | 21:51 |
| 28. juli | 07:26 | 19:45 | 06:26 | 18:45 | 09:26 | 21:45 | 10:26 | 22:45 | 08:56 | 21:15 | 10:11 | 22:30 |
| 29. juli | 08:04 | 20:21 | 07:04 | 19:21 | 10:04 | 22:21 | 11:04 | 23:21 | 09:34 | 21:51 | 10:49 | 23:06 |
| 30. juli | 08:38 | 20:55 | 07:38 | 19:55 | 10:38 | 22:55 | 11:38 | 23:55 | 10:08 | 22:25 | 11:23 | 23:40 |